## Fleiri skotin í skúla

Minst átta fólk doyðu, og umleið 15 onnur vórðu særd, tá ein maður fór at skjóta við ein lærdan háskúla í býnum Baku, sum er høvuðsstaður í Aserbajdsjan. Aftaná skeyt maðurin seg sjálvan. Russiskar tíðindastovur vita at siga, at maðurin tók sjey fólk gíslar, áðrenn hann skeyt tey. Sjónvarpið í Aserbajdsjan segði í morgun, at 15 fólk vóru særd, men hvørki sjónvarpið ella tær russisku tíðindastovurnar vita at siga, hvør byrsumaðurin var, og hví hann fór í skúla við byrsu. Sum skilst var tilburðurin á teirri deildini á skúlanum, sum hýsir útbúgvingum innan oljuvinnu.







*Jan Poulsen, formaður í politistafelagnum, metir, at ávísir manglar eru í nýggju vaktarskipanini hjá løgregluni*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Ónøgt politi í Eysturoy og Norðoyggjum

**Tað er ikki loyvt at planleggja við heimavaktum, og tí mugu politistarnir út at koyra um næturnar. Hetta kann gera, at løgreglan verður bæði skjótari og seinni á staðnum, tí alt veldst, hvar patruljan er. – Tað er serliga í Eysturoy og Norðoyggjum, at politistarnir eru ónøgdir við skipanina, sigur Jan Poulsen, formaður í politistafelagnum**

POLITI
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Bygnaðarbroytingar fara í løtuni fram hjá løgregluni, og Jan Poulsen, formaður í politistafelagnum, greiðir frá, at fleiri politistar ikki er nøgdir við nýggju skipanina.

- Tað eru ov nógv veik lið í henni, og hon merkir eisini, at vit ikki longur planleggja við heimavaktum, sum vit hava gjørt. Tí skulu politistar í Norðoyggjum og Eysturoy, sum fyrr ikki hava verið úti og koyrt um náttina, út at koyra patrulju um náttina, mitt í viku. Hetta eru serliga eldri politistar, sum nú skulu gera nakað, teir ikki hava gjørt fyrr, og í Føroyum hava vit ongan seniorpolitikk, sigur Jan Poulsen.

Hann leggur afturat, at mann kann diskutera, hvussu neyðugt tað er við patruljum uttanfyri Havnina mitt í viku.

### Ov veik skipan

Nýggja vaktarskipanin hjá løgregluni hevur virkað í nærum tveir mánaðir, og Jan Poulsen dugir væl at síggja veikleikar í henni.

- Vit fara at hava fund um skipanina í komandi viku, og fert tú í gongd við eina nýggja skipan, so tekur tað altíð eitt sindur av tíð at fáa hana í rættlag. Eg haldi eisini, at skipanin er ov veik. Verður ein persónur sjúkur, so klára vit ikki at fylla vaktarskemaði, so tað eru tilsamans ov nógv veik lið í skipanini, sigur Jan Poulsen.

### Øðrvísi vaktir

Orsøkin til, at skipanirnar við vaktum hjá løgregluni eru broyttar, er fyri at tryggja heilsuna hjá løgreglufólkunum. Tað er arbeiðsumhvørvislógin, ið er nýggj og hevur við sær, at løgreglan ikki kann leggja til rættis á sama hátt sum fyrr, tá politistar kundu fara beinleiðis av vakt til heimavakt. Heimavakt er, tá løgreglumaðurin kann tilkallast heimanífrá.

- Hendir so tað, at ein maður hevur verið heima í tveir tímar, og so verður tilkallaður, so brýtur mann arbeiðsumhvørvislógina, sum sigur, at løgreglumenn skulu hava minst 11 tímar frí, áðrenn teir skulu á vakt aftur, greiðir formaðurin í politistafelagnum frá.

### Fleiri patruljur

Av tí, at færri heimavaktir eru, so eru samstundis fleiri patruljur úti um landið. Um dagin verða øll øki dekkaði á sama hátt sum fyrr. Um kvøldarnar eru patruljur úti í meginøkinum og í Havn, og tað er tað sama um næturnar.

Tá verður hundapatrulja og ferðslupoliti ikki íroknað, tí tað eru skipanir fyri alt landið.

### Ónøgdir kundar

Hóast hesar nýggju skipanir í prinsippinum skuldu verið effektivari, so er greitt, at tað eru dømir, tá løgreglan kemur seinni á staðið nú, enn hon gjørdi fyrr.

Eitt dømi um hetta var í Klaksvík í vikuni, tá tað tók 40 minuttir, áðrenn løgreglan var á staðnum, til ein bil, ið var farin á sjógv. Tá kom løgreglan úr Havn til Klaksvíkar. Eitt dømi Norðlýsið hevur gjørt eitt sindur við.

- Tá fólk eru von við, at tað tekur fimm minuttir hjá løgregluni at koma á staðið, so sigur tað seg sjálvt, at fólk eru ónøgd, men vit tilkallaðu eisini fólk úr Klaksvík, sigur Jan Poulsen.

### Verður betri

Formaðurin í politistafelagnum greiðir somuleiðis frá, at tað ofta er torført at fáa fólk við í broytingar, ið fara fram, og tað vísir seg at henda nú, men hann er sannførdur um, at tá mann hevur fingið ymisk viðurskifti upp á pláss, so verður henda skipan betri, bæði fyri politistar og borgarar.